# ufríggið

- Á ólavsøku er fríggingarmyrkt í tveir tímar, so tá skal skjótt berast at.
- Gamalt var, at ólavsøkufríggj heldur ikki til jóla.
- Talið á ólavsøkubørnum svitast tó ikki, og hvørt einasta ár eru serliga nógvir nýføðingar í apríl.

## Góð fríggingarstøð:

- Plantagan
- Úti á Reyni
- Gamli Kirkjugarður
- Grøna plássið við síðuna av bispagarðinum
- Á Skansanum
- við Mullers brúgv

## Soleiðis sigur orðabókin:

**Fríggingarmyrkt:**
Á ólavsøku er í tveir tímar nóg myrkt at fríggja

**Fríggj:**
Fáa sær eitt fríggj, samansett: leysafríggj, smáfríggj

**Fríggjaði:**
1 vitja og vera saman við gentu síni/dreingi sínum, hann er farin til Havnar at fríggja
2 hava ástarsamband við, fríggjaði við einum/einari; tey eru farin at fríggja (fjasast); hann fríggjar til hennara (er drongur hennara)
3 bera upp bønarorð, biðja (sær um gentu), biðla, fara at fríggja; fríggjaði til gentu – biðja um gentu; tveir dreingir fríggjaðu til somu gentu (royndu eftir)

# Tað kitlar í tokuni



Her í Havn ber mjørkin og tokulúðurin boð um, at tjóðarhátíðin er í nánd. Og við slavtokuni kemur fríggingarmyrkrið, sum sigst liggja í einar tveir tímar – ella umleið nóg leingi til eitt ólavsøkufríggj.

Fyri nøkrum árum síðani hevði eg eitt kort yvir tey bestu fríggingarstøðini í Havn í Ólavsøkublaðnum. Tað var øgiligt, sum fólk tóku væl ímóti tí, og sum tey høvdu nógvar fríggingarsøgur at fortelja aftaná.

Tað er nakað serligt við ólavsøkuni og tjóðbúnanum. Sjálv haldi eg, at mannfólk eru nakað so vøkur, og ikki sørt eggjandi, í føroyskum klæðum: Skyggjandi silvurknappar, kritahvítar skjúrtuflippur og nýrakaðir nakkar – so verður tað ikki betri. Teir bera seg so væl, eru hátíðarligir og deiliga maskulinir.

Og so hava vit hitt slagið av mannfólkum, sum koma rullandi á ólavsøku í leðurjakka við fløskuslagsíðu, heingireyv, tuflum og vátum varrum – mega turn off.

Eg haldi ofta, at tað er eitt sindur synd í teimum ungu í dag, tí tey eru ON alla tíðina. Fartelefon, kjat, netdating og facebook gera kanska, at ólavsøkan er ikki tað stóra møtistaðið longur, og mystikkurin, tað inniliga og persónliga forelskilsi kann lættliga verða køvt í cyber-space.

Tey hava heilt vist nakrar aðrar preferancur og royndir, til dømis gjøgnum idiotiskar realitysendingar og eitt pornofisera alment rúm, men kortini tvíhaldi eg um, at vanlig føroysk ung eru akkurát líka følin og ósikkur, sum vit vóru, og at eitt forelskilsi er tað sama í dag, sum fyri hundrað árum síðani: ein støða, sum slær beinin undan tær, tá tú sært HANN. Og tað kann ongin taka frá okkum – og slett ikki á ólavsøku.

Eg minnist sum heilt ung, tá Malla, syskinnabarnið, og eg, fóru á ólavsøku. Tá snúði tað seg bara um at skora tveir kammirátar, sum vit kundu mussast við. Tað eydnaðist nakrar ferðir og vit endaðu í bátum, aftan fyri úthúsum og uppi í plantaguni. Serliga minnist eg tann eina, sum opinbart hevði lært, at tá man fríggjar, skal man bara gera akkurát sum tá man etur eitt nekarakyss. Og har stóð eg og bleiv sleikt um alt andlitið sum ein saftigur nekarabolli. Aftan á eina strævna løtu spurdi eg so Mallu, sum vit ikki skuldu skifta um sjeik. Tað kundu vit gott, segði hon, og so fekk eg hennara og hon fekk mín – ungdómligt partnerbytte :))

*Rigmor Dam*